# Arbeiðsformaður

Søkt verður við hesum eftir arbeiðsformanni til Kvívíkar kommunu, at byrja 1. juni 2001. Arbeiðsformaðurin skal eisini vera leiðari fyri sløkkiliðnum hjá kommununi.

Arbeiðsformaðurin átekur sær m.a. at syrgja fyri, at áir, vegir, kloakkir, vatnleiðingar v.m., umframt at kirkjugarðurin í kommununi verður viðlíkahildið o.a. Arbeiðsformaðurin hevur alt viðlíkahaldsarbeiði eins og nýgerð í kommununi um hendi. Arbeiðsformaðurin hevur umsjón við lendingarnar í kommununi og eisini við ognum, bygningum og amboðum hjá kommununi.

Starvið er sett sum fulltíðarstarv.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. mai 2001.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heina Holm, borgarstjóra, tlf. 210294.

**Kvívíkar kommuna**

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Hálvtíðarstarv sum bókhaldari

Søkt verður eftir bókhaldara til skrivstovu felagsins at arbeiða hálva tíð. Møguleiki er fyri, at starvið seinri verður meira enn hálvtíðar starv.

**Bókhaldarin skal taka sær av**

- Dagligu bókingunum
- Limaskrásetingini

**Krøv til umsøkjaran**

- Royndir í bókhaldsarbeiði
- Góðan teldukunnleika
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt

Ynskiligt er, at viðkomandi hevur kunnleika til C5 Concorde skipanina, men er tó ikki ein treyt.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Á skrivstovu felagsins arbeiða ídag tvey fulltíðarsett fólk.
Meira fæst annars at vita um felagið á heimasíðu okkara www.pedagogfelag.fo

Umsóknir skulu vera felagnum í hendi skjótast tilber og í seinasta lagi 25.mai.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til felagið
mánadag - hósdag millum kl.13.30 -16.30

**Føroya Pedagogfelag**
Tungugøta 1
Postsmoga 318
Tórshavn
Tlf. 317576
e.mail: pedagog@pedagogfelag.fo

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 26. apríl 2001 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at B3-vinnuøki við Reynsgøtu, matr. nr. 4 bs og 4 cl, millum Reynstún og Dagstovnin á Argjum, verður broytt til A1-sethúsaøki.

Tilfar, sum lýsir broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mikudegi 9. mai 2001 til og við týsdagin 29. mai 2001, allar gerandisdagar frá kl. 9.00 til kl. 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 9. august 2001.

S N A R S K I V A N

# Havna-umsjónarmaður til Vágs Havn

Vegna ov fáar umsóknir, verður umsóknarfreistin til starvið sum havnaumsjónarmaður við Vágs Havn longd tann 25. mai 2001.

Umsøkjarin skal hava nautiska útbúgving, skal kunna arbeiða við teldum og tosa og skriva enskt.

Løn samb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Vágs Kommunu.

Umsóknir við prógvum og ummælum skulu vera Havnanevndini í hendi í seinasta lagi 25. mai 2001.

**Vágs Kommuna - Havnanevndin**
FO-900 Vágur

# Aðalfundur hjá Føroya Reiðarafelag

Boðað verður til aðalfundar á Hotel Hafnia (Høllin) mikudagin 23. mai 2001 kl. 13.30. Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

P/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

# Tvøroyrar Havn

Við hesum verður starv sum havnameistari lýst leyst at søkja.
Somuleiðis verður lýst eftir hjálparfólki.

Persónslýsing:
- Er fyrikomandi
- Er kundavinarligur
- Er ágrýtin
- Arbeiðir væl saman við øðrum
- Kann laga seg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- Fyrimunur at duga enskt og hava teldukunnleika

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal vera Rasmussen og Weihe P/F í hendi í seinasta lagi 11. mai 2001

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018

Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

# Kømur ynskjast

Søkt verður eftir 2–3 kømrum við atgongd til køk og bað.

J&K
**Tlf. 315060**

# Frá kirkjubøar Sóknar Kommunu

Vallistin til skúlastýrisvalið liggur frammi í skúlanum til 21. mai, allar gerandisdagar frá kl. 14.30 til 16.30.

Fólk, sum ikki eru á vallistanum og sum hava valrætt og valbari, skulu venda sær til skúlan í seinasta lagi 21. mai 2001 við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

Kunnandi foreldrafundur og uppstillingarfundur er 14. mai kl. 19.00 í skúlanum.

**Valnevndin**



TK Stovan

**Ring!**
**Vit koma**

**TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.**

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

# Sky digital og Orbit Network.

**Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.**

**Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.**

**Sjálvandi tann tryggasta loysnin.**

**Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf 421411 ella 255328**




**Fígging kann útvegast**

# Til sølu – til leigu

**Fjalsgarður matr. nr. 85 Oyndarfirði**

Umframt vallaraheim hevur ognin stór fundarhøli ella sum goymsluhøli – atgongd er beinleiðis til báðar hæddir.

Stórur og rúmligur restauratiónskøkur og gestakøkur.

Rúmlig matarstova.

Seingjarpláss til 23 – 2, 4 og 6 mans kømur – umfram høllin, sum rúmar 30 seingjarlegum.

2 toilet við brúsu í ovaru – 3 toilet og brúsur – í niðaru hæð og handicaptoilet.

Søluupphædd kr. 560.000,-

**S/pf Mál & Mentan**
Postboks 220
110 Tórshavn
tlf. 312209 ella 332900

# Pakkihjálp

**Slaktarin í Miklagarði søkir eftir fólki at byrja skjótast tilber.**

Arbeiðstíðin er sett til 25 tímar um vikuna.

Skrivlig umsøkn við møguligum tilmælum verður at senda til:

Slaktarin í Miklagarði
Postboks 1069
110 Tórshavn
Att: Jørgen Jørgensen

**MIKLAGARÐUR**
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn

**Uppsetan og skipan av barrum**

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

# Rætting

Niðanfyristandandi lýsing skuldi verið í leygardagsblaðnum. Av misgávum kom skeiv lýsing frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í blaðið. Sosialurin tekur alla ábyrgd av hesum.

**Sosialurin**

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www. hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Avloysarastarv

Matvørudeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni søkir eftir fólki við akademiskari útbúgving til eitt avloysarastarv. Talan er um starv sum avloysari fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi og seinni eisini aðrar avloysara uppgávur.

Starvssetanin gongur til 31/12/2002. Arbeiðsstaðurin verður á Falkavegi 6, 2. hædd, Tórshavn.

Avloysarastarvið fevnir serliga um íverksetan av innaneftirlitinum á matvøruvirkjum. Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við:

- Skoðan av innaneftirlitið á fiskavirkjum og
- Eftirliti á fiska- og matvøruvirkjum

Avloysarastarvið er sostatt serliga knýtt til skoðanina av innaneftirlitinum. Tú kemur nógv runt í Føroyum og í tal við hópin av fólki, sum arbeiða í fiskivinnuni. Starvið er fakliga og persónliga avbjóðandi.

Vit vilja at tú:

- Hevur arbeiðsroyndir í skoðan av virkjum
- Kanst arbeiða sera sjálvstøðugt
- Ert samstarvsfús/ur
- Hevur góð evni at samskifta við onnur, bæði munnliga og skrivliga
- Dugir við fólki
- Hevur koyrikort

Tú skalt hava náttúruvísindaliga útbúgving við serligum atliti til: Góðskustýring, skoðan (audit), matvørufrøði, framleiðslutøkni o.t.

Tú skalt byrja í starvinum skjótast gjørligt.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið, sí www.lnd.fo

Umsóknin við avriti av prógvi/um, viðmælum, CV o.t. skal vera okkum í hendi mánadagin 21/5/2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Ásmund Guðjónsson ella Bárð Enni á telefon 35 64 00.

**Í Býin**